gult28 cyan28 magenta28 svart28



# Fólk flyta aftur til Múla

**Í juli mánaði flyta fólk aftur til Múla, har ein nýggj slóðbrótandi útvarpsrøð skal takast upp. Studio Pegasus sóknast í tí sambandi eftir trimum familjum at verða við í sendirøðini**

ÚTVARPSSENDING
*Studio Pegasus*

Í 1994 fór seinasti maður úr Múla á Borðoynni. Nú flyta fólk aftur til útdeyðu bygdina, har nýggj útvarpsrøð skal takast upp.

Studio Pegasus fer at framleiða eina nýggja útvarpsrøð, sum skal sendast í Útvarpi Føroya í vetur. Tríggjar føroyskar familjur verða tiknar út teirra gerandisdegi og fluttar til Múla, har tær skulu búgva í eina viku.

Í Múla verður mangt og hvat á skránni. Familjurnar skulu fyrst og fremst royna at trívast í bygdini og í einum gerandisdegi, sum setir onnur krøv til arbeiði, samanhald og frítíð, enn nútíðar menniskju eru von við. Eisini verða kappingar og tiltøk á skránni.

Uppihaldið í Múla verður partur av eini nýggjari útvarpsrøð, sum fer at telja átta sendingar. Umframt upptøkur frá døgunum í Múla verður eisini ymiskt søguligt og samfelagsligt tilfar við tilknýti til Múla og útjaðaran annars við í sendingini.

Eitt framleiðslulið í Studio Pegasus, sum telir eini 10 fólk, fer at standa fyri upptøkunum og framleiðsluni av sendingunum.



*Steintór Rasmussen og fólkini í Pegasus fara at gera nýggja og øðrvísi sendirøð úr Múla. Sendirøðin verður send í Útvarpinum í vetur*

## Familjurnar

Í sambandi við sendirøðini skulu tríggjar føroyskar familjur flyta til Múla at búgva í eina viku.

Tey, sum hava hug at verða við í sendirøðini, hava møguleikan til tað, um tey seta seg í samband við Studio Pegasus.

Ætlanin er, at tríggjar ymiskar familjur skulu verða í Múla í døgunum frá 16. til 22. juli. Ætlanin er at finna tvær barnafamiljur og eitt par uttan børn.

Innivisti, uppihaldi og øðrum skipar Studio Pegasus fyri, og hvør familja fær eina samsýning upp á 8000 krónur fyri at verða við.

Tey, sum kundu hugsa sær at verið við, kunnu skriva eitt bræv til Studio Pegasus, Boks 322, 700 Klaksvík ella umvegis teldupost til pegasus@-pegasus.fo og greiða frá, hví tey halda, at tey eiga at verða við í sendirøðini.

Tað ber til at frætta nærri um sendirøðina á heimasíðuni hjá Pegasus, sum er at finna á www.pop.fo

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men út á seinnapartin veksur hann vindin og regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 11 og 15 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 23 |
| Tromsø | 21 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 27 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1023 hPa. vestan fyri Skotland kemur móti Føroyum.




Hátrýstið við Føroyar fer í landnyrðing , men gevur góðveður meginpartin av vikuskiftinum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/06 kl. 06⁰⁰–21/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/06 kl. 06⁰⁰–21/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 35,6 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

21. juni: Tendring
23. juni: Mánin næstur jørðini
28. juni: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. juni | 08.02 | 20.30 | 07.02 | 19.30 | 07.17 | 19.45 | 10.02 | 22.30 | 11.02 | 23.30 | 06.17 | 18.45 | 05.17 | 17.45 | 08.17 | 20.45 | 09.17 | 21.45 | 07.47 | 20.15 | 09.02 | 21.30 |
| 23. juni | 08.58 | 21.27 | 07.58 | 20.27 | 08.13 | 20.42 | 10.58 | 23.27 | 11.58 | — | 07.13 | 19.42 | 06.13 | 18.42 | 09.13 | 21.42 | 10.13 | 22.42 | 08.43 | 21.12 | 09.58 | 22.27 |
| 24. juni | 09.56 | 22.25 | 08.56 | 21.25 | 09.11 | 21.40 | 11.56 | — | 00.27 | 12.56 | 08.11 | 20.40 | 07.11 | 19.40 | 10.11 | 22.40 | 11.11 | 23.40 | 09.41 | 22.10 | 10.56 | 23.25 |
| 25. juni | 10.51 | 23.17 | 09.51 | 22.17 | 10.06 | 22.32 | 00.25 | 12.51 | 01.25 | 13.51 | 09.06 | 21.32 | 08.06 | 20.32 | 11.06 | 23.32 | — | 12.06 | 10.36 | 23.02 | 11.51 | — |

Kelda. Álmanakkin 2001